# Náttarravnaskeið

**Týsdagarnar 12., 19. og 26 novembur skipar Felagið Náttarravnarnir í Tórshavnar Kommunu fyri skeiði í Losjuni fyri bæði nýggjum og verandi limum**

NÁTTARRAVNAR
*Solby A. Eliasen*



*Tann 12., 19. og 26. november verður skipað fyri skeiði fyri nýggjum og gomlum Náttarravnum í Losjuni*

Tone Kjeld frá Náttarravnunum sigur, at endamálið er at útbúgva nýggjar limir og so eisini at uppfríska hjá verandi limum.

Skeiðini verða hildin týsdagarnar 12., 19. og 26 november.

Týsdagin 12. november verður kunning frá løgregluni um skyldur og rættindi hjá borgarum í sambandi við hetta at vera Náttarravnur. Kunning verður eisini frá Barnaverndini um teirra arbeiði. Sigrun Samuelsen, sálarfrøðingur hjá Barnaverndini heldur fyrilestur um ung.

Týskvøldið 19. november verður alt Náttarravnafyribrigdið gjøgnumgingið; teirra viðtøkur, reglugerð og ikki minst teirra felagsmentan. Hetta kvøldið verður arbeitt við, hvussu tey kunna menna felagsmentanina, so hon hóskar best til viðurskiftini her.

Og tað seinasta skeiðskvøldið, týskvøldið 26. november verður grundkunning um vanlukkuavmarking og fyrstu hjálp. Narkotikabólkurin hjá løgregluni fer at kunna um rúsevni og núverandi støðuna í kommununi. Carl-August Arge, rúsdrekka- og narkotikarágevi fer at halda fyrilestur um ung og rúsevni.

Tone sigur, at øll kunnu koma við til hesi skeiðini. Tað vil siga, at einum nýtist ikki at vera limur ella at hava tikið avgerð um at gerast limur fyri at luttaka á skeiðinum.

\- Skeiðið er alment og øll eru hjartaliga vælkomin, sigur Tone Kjeld.

Nú hava Náttarravnarnir gingið úti í býnum í skjótt eitt ár, og tað hevur verið sera vælmóttikið millum ung. Tone sigur, at tað kemur meria enn so fyri, at tá Náttarravnarnir ganga úti, at fólk koma at fregnast um teirra virksemi.

Tað eru gott 70 limir í Náttarravnunum í dag, men ikki allir ganga úti um vikuskiftini.

\- Tað vil altíð vera so, at summi ikki hava hug at ganga úti, men kortini fegin vilja stuðla, so tey eru stuðulslimir, sum rinda eina sera rímuliga upphædd sum eitt limagjald, greiðir Tone frá.

Hini sum ganga úti eru býtt í bólkar við trimum, og tey skiftast so at ganga. Tey eru so mikið nógv, at tað nýtist ikki at verða so tætt millum túrarnar. Summi ganga einaferð um mánaðin, men tað eru ikki øll, sum ganga hvønn mánaða.

Tone Kjeld sigur, at tað er ikki at halda seg aftur, tí tey ynskja nýggjar limir.

\- Tað er altíð gott fyri ein felagsskap, at tað eru nógvir limir, sigur Tone Kjeld.

\- Vit hava bara fingið positivar viðmerkingar til okkara virksemið og løgreglan segði herfyri í útvarpinum, at tað merkist væl, at vit eru har, sigur hon og heldur fram, at um tað onkuntíð eru útlit til, at tað fer at verða bardagi, og tey so síggja Náttarravnarnar, so er tað ofta, at tað fjarar út heldur enn at blíva til tann stóra bardagan. Men so hinvegin, verður tað til rok, so ringja Náttarravnarnir eftir løgregluni.

Áhugin fyri at gerast Náttarravnur er rímuliga stórur. Tað koma alla tíðina nýggj. Og Tone sigur, at tað er ofta, at foreldur steðga á gøtuni og siga, at tað skjótt verður teirra túrur at verða Náttarravnur, tí børn teirra eru komin í tann aldurin.

Hon heldur, at Náttarravnarnir eru komnir fyri at verða, og hon letur væl at móttøkuni, sum tey hava fingið hetta árið, tey hava virkað. Eisini veit hon at siga frá, at tey hava fingið fyrispurningar frá fólki, sum hugsa um at stovna Náttarravnafelagsskap aðrastaðni í landinum.

Um fólk ynskja at fáa meira at vita um hetta skeiðið ella Náttarravnarar, so kunnu tey ringja til Carl August Arge á tlf 215570 ella Tone Kjeld á 311707.

# Nýggj barnabók

**Sleppi eg til himmals við báti, ella kann eg koyra við bili? Fái eg eitt kamar, sum eg skal eiga sjálvur? Hetta eru bara nakrir av spurningunum, sum verða settir í bókini, Himmalin, sum Heimamissiónsfelagið, HMF, gevur út í næstum**

TÍÐINDASKRIV

Talan er um ein lítla barnabók úr røðini Smáar Signingar, haðani vit longu kenna bøkurnar, Bíblia teirra smáu og Bønir teirra smáu. Bókin viðger spurningar, sum børn av og á kunnu spyrja. Fyrst verða nakrir spurningar settir, og oftast eru teir júst eftir barnasinninum, til dømis: Er nakar djóragarður í himlinum? Síðan verða spurningarnir svaraðir heilt stutt, og aftast eru bíbliuávísingar til foreldrini at vísa børnunum á, tá tey seta spurningar.

Bókin er prýdd við sera fittum myndum av børnum, sum spæla saman. Myndirnar hevur tann kenda listakvinnan, Elena Kucharik teknað. Hon hevur eisini teknað myndirnar til Bíblia teirra smáu og Bønir teirra smáu. Kathleen Long Bostrom hevur skrivað, og Simona Johannesen hevur týtt bókina til føroyskt. Hon fæst til keyps frá Heimamissiónsforlagnum í Nesvík og á heimasíðuni hjá forlagnum: www.mission.fo/hmf.

Bókin kostar 79 krónur. Himmalin er ein sera fitt og prýðilig bók, sum er eitt væl egnað føðingardagsella jólagávuuppskot til tey smærru.

# MC Hár rokkar á Kambsdali

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Í kvøld verður stór konsert/dansur á Kambsdali. Umframt tað vælumtókta DJ-showið fara MC Hár eisini á pallin, og er lagt upp til eitt rimmar show, og lovar bólkurin, at áhoyrararnir fáa konsert fyri allar pengarnar.

Heili níggju fólk verða á pallinum í senn, og sum øll vita, duga teir ógvuliga væl at fáa lív í áhoyrarafjøldina.

Spildurnýtt lasershow verður eisini, og hetta er fyrsta ferðin tað verður nýtt. Bussar koyra úr Havn, so øll kunnu sleppa at uppliva MC Hár.





Eyðbjørg Joensen, rørslutarnað:

# – Kenni meg til fortreð

**Eyðbjørg Joensen hevur bara havt eitt bein í fimm ár. Hon fílist stórliga á umstøðurnar, sum tey rørslutarnaðu hava, tá tey eru í býnum. – Eg havi í fleiri dagar skulað ørindir inn á Almannastovuna, men uttanfyri er onki parkeringspláss til rørslutarnað, sigur Eyðbjørg Joensen**

RØRSLUTARNAÐ
*Ingrid Bjarnastein*



*Eyðbjørg Joensen hevur bara eitt bein. Hon fílist á tær serstakliga vánaligu umstøðurnar, sum rørslutarnað hava í býnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eyðbjørg Joensen úr Havn hevur seinastu fimm árini bara havt eitt bein. Eyðbjørg fílist stórliga á vánaligu umstøðurnar rørslutarnað hava í býnum.

– Seinastu dagarnar havi eg ætlað mær inn á Almannastovuna eitt ørindi, men uttanfyri er onki parkeringspláss til rørslutarnað, so eg sleppi als ikki av við bilin hjá mær, greiðir Eyðbjørg frá.

Soleiðis er tað eisini alla aðrastaðni í býnum. Illa ber til hjá Eyðbjørg at fara út uttan hjálp frá familjuni, tí parkeringsplássini eru í fyrsta umfari so fá, og í øðrum umfari, so eru bara nøkur heilt fá til rørslutarnað.

– Eg brúki so nógv pláss tá eg skal úr bilinum. Um eg ikki fái hurðina heilt upp, so sleppi eg ikki út fyri beininum hjá mær. Hetta verður eisini sjáldan hugsað um, tá parkeringsplássini verða gjørd, sigur Eyðbjørg Joensen.

Eisini rundan um SMS eru heilt fá parkeringspláss til rørslutarnað. Bara eitt av teimum nógvu í parkeringsplássunum í kjallaranum er avsett til fólk í koyristóli ella líknandi, og heldur Eyðbjørg, at hetta er alt ov lítið.

– Tey flestu, sum eru handikappað fara í SMS, tí tú kanst ikki fara allastaðni. Men ofta, so eru onnur sum eru frísk, so ófólkalig, at tey taka tað eina parkeringsplássið sum er avsett til tey handikappaðu.

## Til fortreð

Eyðbjørg greiðir víðari frá, at nú ein dagin skuldi hon eitt ørindi í býnum. Ikki fyrr enn triðja dagin fann hon eitt parkeringspláss, sum hon kundi brúka.

– Um eg skal oman í býin, so má onkur í familjuni við og seta meg av, koyra fyri at finna eitt parkeringspláss, avheinta bilin aftur og síðani koma aftur eftir mær. Um tað er vindur ella gler, so missi eg javnvágina, so tað er ikki so lætt, fortelur Eyðbjørg.

Hon vísir eisini á, at hon hevur ferðast nógv aftur og fram til Klaksvíkar við Dúgvuni. Umborð á Dúgvuni er ongin lyft og tað er tað heldur ikki í flestu skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins.

– Tú sleppur ikki at sita í bilinum, og ongin lyft er, og tað merkir so, at tú noyðist at fara upp á. Um eg skal upp á, so má eg ganga eitt trin í senn, og tað tekur langa tíð. Tá eg so einaferð komi upp, so er trappan full aftanfyri meg. Tá veðrið er gott, plagi eg at fara niður nakrar minuttir áðrenn, tí um eg fari tá øll hini fara, so fyllist trappan aftur aftanfyri meg, sigur Eyðbjørg, sum leggur afturat, at tá tað er soleiðis, so kennir ein tað sum um ein er til fortreð allastaðni.

Sjálv dámar Eyðbjørg væl at fara út, og tað roynir hon nógv av. Men tað er ógvuliga trupult, tí tað ber so illa til bara at fara út ein túr.

– Tað eru ógvuliga fá rørslutarnað í býnum, og eg haldi, at tað eru tí, at umstøðurnar eru so vánaligar. Mær dámar væl at fara út, men at Almannstovan ikki skal hava eitt parkeringspláss til rørslutarnað er toppurin!

Í fjør gekk Eyðbjørg á kvøldskúla í Eysturskúlanum. Har eru trappur og ein bakki niður, sum er gjørdur serliga til koyristól, men har er ongin gelendari, at halda í.

– Eg kann als ikki ganga gjøgnum trappur uttan gelendara, og tað vísir seg, at vanta nógva staðni. Tað er bara ein bílig loysn, sum er gjørd á flestu plássunum.

Eyðbjørg heldur eisini, at røsk fólk áttu at hugsað seg betur um, tá tey fara út – serliga við bilinum. Hon hevur alt ov ofta sæð fólk parkera á plássinum, sum er avsett til tey rørslutarnaðu, og so kemur onkur rennandi úr bilinum.

– Fólk eru ov ófólkalig. Tey hugsa seg ikki um, sigur Eyðbjørg Joensen, sum ynskir, at myndugleikarnir fara at betra um hesar umstøðurnar í framtíðini.

# Kalendarin hjá Deyvafelagnum

JÓLAKALENDARI
*Ingrid Bjarnastein*




Jólini nærkast, og so spakuliga byrjar jólahýrurin at stinga seg fram. Og nú er so smátt byrjað at selja jólakalendarar kring tey mongu húsarhaldini í Føroyum.

Deyvafelag Føroya hevur aftur í ár prentað ein sera snotuligan jólakalendara í og í hesum døgum verður hann seldur kring oyggjarnar.

Hermundur Zachariassen, sum er deyvur, hevur teknað kalendaran, og pengarnir, ið koma inn fara til Deyvafelagið og Grunn Teirra Deyvu.

Jólakalendarin kostar 50 krónur, og er samstundis eisini ein lutaseðil við gávukortum sum vinningar. Tríggjar ferðir verður trekt áðrenn jól. Tann 1., 3. og 10. desember.

Deyvafelagið sigur í tíðindaskrivi, at fegnast um góða stuðulin seinastu árini og vóna, at undirtøkan verður eins góð í ár og undanfarin ár.

# GSM teletíð á alnetinum

TELEFONIR
*Ingrid Bjarnastein*

Um tú ert ein av teimum, sum hevur GSM Teletíð frá Føroya Tele, so ber nú til hjá tær, at fáa Teletíð umvegis alnetið.

Í vikuni gjørdu Føroya Tele og hallo.fo eina avtalu, sum ger, at kundar hjá Føroya Tele nú kunnu fylla Teletíð á GSM telefonina gjøgnum einaskipan, sum Farodane hevur gjørt til hallo.fo.

Á henda hátt kann Teletíð gjaldast beinaleiðis við FR/visakorti á alnetinum, og hetta er ein skipan, sum ógvuliga væl umtókt í londunum rundanum okkum.

Skipanin er løtt at nýta. Kundin verður biðin um at geva nakrar upplýsingar. Tá allar upplýsingarnar eru settar inn, fær kundin eina kodu, sum verður nýtt til fylla Teletíð á kortið. Sum eina eyka trygd, so fær kundin koduna við postinum.

Skipanin er nú á www.hallo.fo